gult cyan magenta svart



## Viðmerkingar:

# Óhefta kanning av fjarhitanum!



Síðstu tíðina er týðiliga komin til sjóndar ónøgdin hjá teimum mongu, sum eru knýtt at fjarhitaskipanini, tí prísurin er ov høgur og prísgrundarlagið ov veikt.

Tað ljóðar eisini heilt løgið, at tað skal bera til at senda fólki eina risastóra rokning, tí prísurin á einari heilt aðrari og fullkomuliga óviðkomandi vøru er farin upp.

Fjarhitanevndin hjá eigarafeløgunum hevur skotið upp, at ein óheft kanning verður gjørd av fjarhitanum — og ikki minst fjarhitaprísinum.

Tað má eisini vera tað minsta, eitt alment felag sum Fjarhitafelagið kann taka undir við, tí ein óheft kanning av viðurskiftunum er tað einasta, ið kann geva greiðu á, hvussu fjarhitaviðurskiftini hanga saman og eiga at hanga saman.

At oljuprísurin, sum jú í grundini einki hevur við fjarhitan at gera, skal verða nýttur sum prísútrokningargrundarlag, ljóðar ið hvussu er ikki skilagott.

Og serliga ikki, tá úrslitið av hesum er, at fjarhitabrúkararnir í Tórshavnar kommunu síðstu tríggjar mánaðirnar í ár og tríggjar teir fyrstu næsta ár skulu gjalda fleiri túsund krónur, tí ein óviðkomandi prísur er farin upp.

Fyri at fáa loyst hetta gamla stríðsmál, eigur ein óheft kanning at verða sett í verk sum skjótast.

Hetta eigur at verða gjørt, so partarnir ikki skulu hava fyri neyðini at standa so langt frá hvørjum øðrum, samstundis sum allur ivi um prís og fjarhita sum heild verður ruddaður burtur.

**Heðin Mortensen**
**býráðslimur**
**sambandsvalevni til**
**Tórshavnar býráð**

# Borgarin hevur krav at fáa góða og skjóta tænastu



**Havast má í huga, at býráðið er fyri borgaran, og ikki umvent**

Tann, ið hevur eitthvørt við býráðið at gera, hevur ofta merkt, hvussu seint býráðsarbeiðið gongur. Tað kunnu ganga vikur áðrenn svar fæst uppá fyrispurning, ið sendur er býráðnum. Bæði umsitingin og polittikararnir vita um hesa støðu, ið borgarin verður settur í. Roynt hevur verið at bøta um mannagongdina innan býráðsgátt. Tað nýggjasta, sum er gjørt fyri at bøta um støðuna, er at snarskiva er sett á stovn. Vónandi vil borgarin merkja ein effektivitet við snarskivuni, so at vanligir spurningar og léttar umsøknir kunnu verða avgreiddar skjótt og væl av umsitingini.

Talva I




Men snarskivan er bert ætlað at avgreiða umsitingarligar spurningar. Verri stendur til, um ein fyrispurningur krevur politiska støðutakan. Har er mannagongdin alt ov drúgv, og harvið fær borgarin eina ov vánaliga tænastu. Sum dømi kann nevnast, at eitt vanligt byggimál kann taka mánaðir at verða avgreitt, bara tí at tann polittiski bygnaðurin er stirvin og ótíðarhóskandi. Eins og vinnan má laga seg eftir kundunum, eigur kommunan at laga seg eftir borgarunum.

Verandi polittiski bygnaður, ið hevur sjey nevndir, sær soleiðis út: Sí talvu I.

Sum bygnaðurin er í dag, kann eitt byggiloyvi, sum er á havnaøkinum, reika aftur og fram millum fimm nevndir, áðrenn býráðið er klárt til at avgreiða málið.

Talva II




Hetta góða byggiloyvi skal fyrst í havnanevndina, síðan í teknisku nevnd og so í byggi-, Heilsu-, og fíggjarnevndina fyri síðan at enda á býráðsborði. Tað løgna við omanfyri nevndu mannagongd er, at tað eru somu starvsfólk og somu polittikarar, ið manna nógvu av nevndunum.

Fyri at stytta um politisku málsviðgerðina í býráðnum, vildi niðanfyri bygnaður hóska betur: Sí talvu II.

Hesin einkli og létti bygnaðurin vildi stytt omanfyri nevnda byggimál munandi, til gleði fyri bæði borgara, starvsfók og polittikaran.

Allar arbeiðsgongdir innan býráðsgátt eiga at verða eftirhugdar, og har tað kann rationaliserast, eigur hetta sjálvsagt at verða gjørt. Vinnulívið noyðist at effektivisera og rationalisera, fyri at fáa sum mest úr hvørjari krónu. Sama eigur tað almenna at gera, so borgarin ikki rindar óneyðuga nógv í skatti.

Vinarliga

**Jan Christiansen,**
**býráðslimur fyri**
**Fólkaflokkin**

# 1000 ár síðan Jesus kom til Føroyar

*Í sambandi við fagnaðarárið Føroyar kristnar í 1000 ár hevur Undirvísingar og Mentamálastýrið givið út eina fløgu og eina kirkjusøguliga plakat til tann føroyska fólkaskúlan*

Fyrr í ár vóru nakrir fólkaskúlalærarar námsferð í Ísrael, og frá hesari ferð er gjørd ein myndarøð. Myndarøðin er nú skipað á fløgu saman við teksti og ljóði, ið sýnir eina ferð í Jesusar fótafetum. Endamálið við fløguni er at kunna skúlanæmingar um tey støð, har kristindómurin hevur sín uppruna.

Við ljósvørpu kann myndarøðin verða nýtt í felagsundirvísing, men kann eisini verða nýtt sum einstaklingsundirvísing, har næmingurin sjálvur situr við telduna og leitar ígjøgnum tilfarið.

Kirkjusøguliga plakatin er gjørd við tí fyri eyga at geva næmingunum eina kenslu av tíðarfestingini av teimum ymisku søguligu stórhendingunum frá ár 0 til ár 2000. Á plakatini eru myndir við teksti og einari tíðarlinju.

Ætlanin er, at allir fólkaskúlar í landinum fáa hvør sína fløgu ókeypis, og at hvør skúlaflokkur fær eina kirkjusøguliga plakat. Tilfarið verður skúlunum í hendi, áðrenn evnisvikan »1000 ára hald« byrjar í dag.

Tvær føroyskar reklamufyritøkur hava staðið fyri arbeiðnum í hesum sambandi – Repro Z hevur gjørt fløguna, meðan Team 85 hevur gjørt plakatina.



*Føroyskir lærarar á ferð í Jesu fótafetum í Ísrael*



## Viðmerkingar:

# Miðvísur ungdómspolitikkur



Í Havn er ein heilur hópur av ymiskum áhugafeløgum fyri ung, sum hvørt í sínum lagi gera eitt stórt arbeiði. Hesi feløg eru í flestu førum borin uppi av sjálvbodnari og óløntari arbeiðsmegi, og í ávísum førum við einum minni fíggjarligum ískoyri frá býráðnum. Hetta er alt mikið gott og heldur vónandi fram, eisini við einum ávísum stuðli úr kommunukassanum.

Men tað er kortini ikki nóg mikið. Býráðið eigur at seta sær fyri at reka ein miðvísan ungdómspolitikk, har íløgur verða settar av á langtíðar fíggjarætlanini.

Tiltakið við Margarinfabrikkini í miðbýnum í Havn varð sett í verk fyri nøkrum árum síðani. Býráðið leggur hús til og rindar ávísar fastar útreiðslur umframt løn til starvsfólk. Tiltøkini í húsinum verða fyriskipaði av starvsfólkunum, og ikki minst saman við ungdóminum sjálvum. Tað er altavgerandi, at tey ungu fáa holla vegleiðing í teimum tiltøkum, sum fara fram í einum tílíkum ungdómshúsi, uttan at talan er um stýring. Endamálið má vera, at tey ungu fáa møguleikar at menna seg, soleiðis at tey sjálvi kunnu standa fyri tiltøkum av ymiskum slag. Tað tykist, at hendan roynd er komin fyri at vera, og tí eigur býráðið framhaldandi at veita sín stuðul.

Eitt tiltak, sum minnir um tað við Margarinfabrikkini, var ungdómshúsið Skansastova. Til tíðir var sera stórt virksemi í Skansastovu, og til aðrar lítið og einki til tað datt niðurfyri. Høvuðsorsøkin til, at virksemi var so ymiskt, og til endans datt niðurfyri, hevur uttan iva verið, at alt arbeiði var treytað av sjálvbodnari arbeiðsmegi. Og tað er júst hetta, sum er aðalmunurin við Skansastovu og Margarinfabrikkini er.

**Eisini umstøður í útjaðaranum**

Tað er ikki nógmikið, at ungdómurin hevur ítrivsmøguleikar í miðbýnum, og tí eiga umstøður eisini at skapast í útjaðaranum — í teimum ymisku íbúðarøkjunum. Tað hevur við sær størri trivnað og møguleikar í heimliga umhvørvinum og tekur harafturat eisini óttan hjá mongum foreldrum burtur av tí at børn og hálvvaksin mugu leita sær oman í býin, tí umstøður eru ikki í heimliga umhvørvinum.

Trivnaðarmøguleikar hjá ungum sum eldri eiga at vera ein heilt natúrligur partur í einhvørjari útstykking. Bæði teimum verandi og teimum sum nú eru á tekniborðinum. At komandi ítróttarhøllin verður løgd í Hoyvík er tí eitt gott stig á hesi leið.

**Tórfinn Smith,**
**býráðslimur**
**og valevni**

# Tryggleika framum ruðuleika



Sitandi býráð - undir tjóðveldisleiðslu - hevur megnað at fingið kommununa úr tí fíggjarliga óføri, hon kom sær útí upp gjøgnum áttatiárini.

Eftir drúgt og strævið upptak, ber nú av røttum til at siga, at skútan umsíðir aftur er fingin upp á rættkjøl.

Uppskriftin hevur verið ein varligur fíggjarpolitikkur, har serligur dentur hevur verið lagdur á at fáa niðurgoldið skuldina sum skjótast.

Uttan at neyðugt hevur verið at hækka skattaprosentið.

Og hvussu væl hevur so hildnast?

Jú, við árslok í ár er skuldin komin niður í eina helvt av tí, hon var fyri fýra árum síðani.

Frá 1. januar 1997 til 31. desember 2000 er bruttoskuldin hjá Tórshavnar kommunu (og Tórshavnar havn) skerd við 319 milj. kr. - úr 643 niður í 324 milj. kr.!

Úrslitið av hesum er, at skuldin fyri fyrstu ferð í mong, mong ár er minni enn eina álíkning (t.e. ein ársinntøka í skatti).

Í sama tíðarskeiði eru skattaintøkurnar hjá kommununi øktar úr 258 milj. kr. til 336 milj. kr.

Avrátt er við lánsveitararnar, hvussu restin av skuldini skal fáast út av verðini.

Sambært hesum verður Tórshavnar kommuna at kalla skuldarleys um níggju ár (og Tórshavnar havn um 15 ár).

Restskuldin hjá kommununi sjálvari verður um ársskiftið 234 milj. kr. brutto og hjá Tórshavnar havn 90 milj. kr. Sambært uppskotinum til fíggjarætlan fyri næsta ár, ið verður lagt fram í næstum, skal kommunan rinda góðar 50 milj. kr. tilsamans í lánsgjøldum næsta ár. Hetta svarar til 13 prosent av fíggjarætlanini.

Ætlanin er, at kommunan í framtíðini í mest møguligan mun sjálv skal fíggja neyðugt gjaldføri til íløgur. Raksturin skal hinvegin sjálvandi altíð fíggjast av skattainntøkunum.

Umráðandi er, at sami skynsami fíggjarpolitikkur, ið hevur sermerkt hetta valskeiðið, heldur fram næstu árini - og her hevur tað stóran týdning, hvør ið er róðursmaður.

Vandi er í hvørjari vælferð, og tí ræður um - fyrst og fremst hjá veljarunum - at forða fyri, at politikarar sleppa framat, ið ikki hava rætta hugburðin á hesum øki.

Fáa hesir makt, sum teir hava akt, ja, so er sanniliga orsøk til at stúra fyri, at ólag skjótt kemur í aftur.

Og at neyðugt veruliga er at vera á varðhaldi, fáa vit sjón fyri søgn um í hesum døgum bæði í bløðum og á heimasíðum.

Hygg bara, hvussu tey ymsu valevnini blaka um seg í allar ættir við gyltum lyftum, sum tey siga seg vilja seta í verk her og nú - uttan at greiða nærri frá, hvussu alt hetta skal fíggjast.

Við slíkum politikarum á odda er fryktandi fyri, at ikki slepst undan nógv hægri skattaprosenti.

Til ber nevniliga ikki longur (smbrt.nýggju kommunulógini) at hava størri skuld enn eina álíkning, uttan loyvi frá landsstýrinum - og harvið seta kommununa undir umsiting.

Tað kann eg illa ímynda mær, at veljarin er áhugaður í. Hann velur sjálvandi - eins og undirritaði - tryggleika framum ruðuleika.

Umsett til vanligt havnarmál merkir hetta, at vit eiga at halda fram við at útbyggja og menna kommununa og kommunalu tilboðini eftir nøkulunda sama skilagóða leisti, ið hevur verið lykilin til framburðin seinastu fýra árini.

Vinarliga

**Leivur Hansen,**
**borgarstjóri**

*Tíðindaskriv*

# Verkætlan um greiðari viðurskifti millum land og kommunur

Løgmaður hevur avgjørt, at tað framhaldandi arbeiðið við at umskipa viðurskiftini millum land og kommunur verður skipað sum ein verkætlan.

Endamálið við verkætlanini er eitt greiðari uppgávu- og ábyrgdarbýti millum land og kommunur.

Verkætlanin verður framd í tveimum umførum.

**Fyrsta umfar**

Fyrsta umfar er við støði í kommunuálitinum at staðfesta og raðfesta økini innan hvørt einstakt aðalstýri, har uppgávu- og ábyrgdarbýtið skal gerast greiðari.

Til hetta endamál verður settur ein arbeiðsbólkur undir leiðslu av Løgmansskrivstovuni. Limir í arbeiðsbólkinum eru umframt Løgmannsskrivstovuna, eitt umboð fyri hvørt av kommunufeløgunum og eitt umboð fyri avvarðandi aðalstýri. Bólkurin verður skipaður soleiðis, at Løgmannsskrivstovan og umboðini fyri kommunufeløgini verða kjarnan meðan umboðini fyri aðalstýrini eru við, tá staðfest og raðfest verður innan økið hjá teirra aðalstýri.

**Annað umfar**

Annað umfar er við støði í raðfestingini, ið er staðfest, í fyrsta umfari at seta arbeiðsbólkar at arbeiða við teimum økjum, ið eru raðfest fyrst. Samansetingin av arbeiðsbólkunum er tann sama, tó soleiðis at arbeiðsbólkarnir verða víðkaðir soleiðis, at áhugabólkar á teimum ymsu økjunum eisini eru umboðaðir.

**Tíðarætlan**

Fyrsta umfar skal vera liðugt hálvan november. Við støði í úrslitinum av fyrsta umfari verður gjørd ein samlað tíðarætlan fyri annað umfar, ið byrjar skjótast gjørligt aftan á hálvan november.

*Tinganes 17. oktober 2000*
**Løgmansskrivstovan**

**Hjá okkum fáast vognar og útgerð til allar flutningsuppgávur!**

- **Viðfestisvognar sum lasta frá 325 kg. upp til 2.600 kg.** –nógv model!'
- **Eykalutir til viðfestisvognar**
- **Sekkjavognar, hydr. lyftiborð –arbeiðsbord**
- **Vognar til gassfløskur, oljutunnur, kassar, trappir** –óteljandi møguleikar!
- **Gafflar til heisan av plattum, vøru o.a.**
- **Tip - Ruskkonteinarir til trukkar**
- **Spennireimar og lyftistroppar**
- **Sleipikrókar til øll bilmerki!**

Sosialurin - 311820

Tosið við okkum!

**Kaj Andreasen & Co**

Sandvíkarhjalli - Tel. 315600 - Fax 318008

